

# Spildurnýggjur frítíðarskúli við Løgmannabreyt

Kom og ver við til at seta tín dám á at uppbyggja og skapa ein frítíðarskúla við nógvum spennandi og mennandi møguleikum, við rúmum til eitt nú drama, tónleik, teldu, máli-, træ-, og leirverkstað og drívhús.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt áhugavert og spennandi starv, har tú frá byrjan verður við til at mynda títt dagliga arbeiði og skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag saman við børnunum, har vinarlag, trivnaður, spæl, rørsla og ymiskt ítriv hevur stóran leiklut í gerandisdegnum.

Frítíðarskúlin hevur pláss fyri 96 børnum í aldrinum 6-9 ár. Frítíðarskúlin og skúlin fara at arbeiða tætt saman, har barnið er í miðdeplinum.

**Hetta vænta vit av tær**
Tú ert nýhugsandi og skapandi, hevur virðing fyri tí einstaka barninum, kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur og vilt verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí, sum vit seta okkum sum mál.

**Vit hava brúk fyri**
- Tveimum pedagogum, harav annar helst skal vera ítróttarpedagogur, at arbeiða 30 tímar um vikuna.
- Einum ítróttarsinnaðum hjálparfólki at arbeiða 25 tímar um vikuna.

Størvini verða sett frá 11. august 2008.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Ynskir tú at vita meira?**
So ring til stovnsleiðaran, Sandru Mikkelsen, telefon 21 43 64.

**Umsóknir**
Umsóknir við viðmælum og upplýsingum um royndir og útbúgving skulu sendast til postrúm 3189, 110 Tórshavn ella til ftstog@torshavn.fo í seinasta lagi 2. aug 2008.

**Tórshavnar kommuna**

---



# Løgfrøðingur
## til Almanna- og heilsumálaráðið

**Lýst verður eftir løgfrøðingi at seta sum fulltrúi á nýggju Almannapolitisku deildini skjótast til ber.**

**Um starvið**
Sum løgfrøðingur í Almannapolitisku deildini verða uppgávur tínar m.a. at tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir á almannaøkinum, at svara fyrispurningum frá løgtinginum og at tulka lógir og reglur fyri stovnar undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Í løtuni vantar okkum ein fulltrúa til barnaverndarøkið, so tað er ein fyrimunur um tú hevur áhuga í hesum. Starvið sum løgfrøðingur á Almannapolitisku deildini er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Hóast starvið er sjálvstøðugt og ábyrgdin stór, so verða uppgávurnar loystar í samstarvi við aðrar starvsfelagar, eitt nú leiðandi løgfrøðingin í ráðnum. Tú fært góðar møguleikar fyri skeiðum og framhaldandi eftirútbúgving.

**Førleikakrøv**
Tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv. Starvsroyndir frá miðfyrisitingini ella aðrar løgfrøðiligar starvsroyndir er ein fyrimunur. Harumframt hevur tú góð samstarvsevni og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:
Almanna- og heilsumálaráðið,
Eirargarður 2,
FO-100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 24. juli 2008.

**Nærri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðun Mohr Hansen, deildarstjóra, tel 30 40 50, ella tp. ahr@ahr.fo.

KREA

**ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn . Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo